


# Gerst partur av einum spennandi og nýhugsandi toymi!

*Ímynda tær, tit hava fingið grundstykki og skulu nú fara at byggja. Tit hava avtalað tíð við kundaráðgevan í Norðoya Sparikassa, koma inn og verða boðin í SparCafé'ina, har kundaráðgevin tekur ímóti. Meðan børnini bæði hugna sær í Silvalandinum, bíleggja tit okkurt gott úr café'ini. Konan fær sær cappucino og pannukøku við ísi, meðan maðurin fær sær ein kaffimunn og kransakøku. Eftir at hava prátað eina løtu um leyst og fast, fer prátið at snúgva seg um húsini, tíðarætlan, hvat tey væntast fara at kosta, hvussu nógv tit vilja sita fyri hvønn mánað, hvussu Heimlánið virkar o.s.fr. Og eftir eina góða, upplýsandi og - ikki minst, vælsmakkandi løtu, eru allar avtalur fingnar uppá pláss...*

*Hetta verður ein av framtíðar kundastøðunum á nýggju deild Norðoya Sparikassa í Miðlon í Havn og sum frálíður eisini í Klaksvík og Saltangará.*

*Nógv tíð og orka er løgd í at menna eitt nýtt konsept, har tað at støkka inn á gólvið í Norðoya Sparikassa, gerst ein góð uppliving við høgum tænastustøði og góðari ráðgeving.*

*Og ein hin mest týðandi táttur í einhvørjum slógbrótandi virksemi eru starvsfólkini!*

*Er hetta nakað fyri teg, so les víðari. Tí ert tú jalig/ur av lyndi, hevur góð samstarvsevni, humor, lætt við at tosa og samskifta við fólk, gott sjálvsálit og persónliga útstráling eins og tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt og við støðugt nýggjum avbjóðingum, er Norðoya Sparikassi kanska júst arbeiðsplássið fyri teg...*

*Nýggja deildin í Havn letur upp í heyst og vit leita tí eftir privatkunda- og vinnukundaráðgevum, sølufólki, húsameklara, eins og café- og móttøkufólki.*



*„Vit vænta okkum nógv av nýggja konseptinum, hvørs høvuðsendamál er at geva kundanum eina góða og óformella uppliving - og hevur tú hug at gerast ein av okkara, skalt tú bara senda okkum eina umsókn."*

Marner Mortensen,
*varastjóri og deildarleiðari*

## KUNDARÁÐGEVARAR

Sum kundaráðgevi gerst tú ein týðandi partur av einum nýggjum og øðrvísi peningastovnskonsepti, har stórur dentur er lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða, jaliga og professionella uppliving, hvørja ferð vitjað verður í sparikassanum. Tú veitur eitt nú ráðgeving innan øki sum fígging, pensjón og íløgur, ger roknskaparmetingar eins og tú gerst partur av einum vælvirkandi toymi av ráðgevum. Peningastovnsútbúgving er ikki ein treyt.

## CAFÉ- OG MÓTTØKUFÓLK

Sum café- og móttøkufólk gerst tú ein týðandi partur av einum nýggjum og øðrvísi peningastovnskonsepti, har stórur dentur er lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða, jaliga og professionella uppliving, hvørja ferð vitjað verður í sparikassanum. Starvið umfatar alt vanligt caféarbeiði eins og eitt nú móttøku sparikassans. Peningastovnsútbúgving er ikki ein treyt.

## HÚSAMEKLARI

Sum húsameklari gerst tú ein týðandi partur av einum nýggjum virkisøki, samstundis sum hetta gerst ein sjálvsagdur partur av nýggja og øðrvísi peningastovnskonsepti okkara, har stórur dentur er lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða, jaliga og professionella uppliving, hvørja ferð vitjað verður í sparikassanum. Við einari húsasølu fer Norðoya Sparikassi eisini at veita eina góða ráðgeving, eitt nú í samband við keyp og sølu av húsum, marknaðarføring og uppskot um fígging...

***Ljóðar hetta áhugavert ella hevur tú eitthvørt at spyrja um***

So ert tú vælkomin at seta teg í samband við
Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðara, á tel. 475072, fartel. 775072 ella umvegis t-post: eydunn@ns.fo,
ella Marner Mortensen, varastjóra og deildarleiðara í Havn, á tel. 475070, fartel. 775070 ella t-post: marner@ns.fo

***Vit gleða okkum til at fáa tína umsókn, ið skal sendast til:***

Norðoya Sparikassi, Ósávegur 1, Postboks 149, FO-700 Klaksvík, Att: Eyðun Nolsøe, starvsfólkaleiðari



UMSÓKNARFREISTIN ER 12. SEPTEMBER 2006

ns@ns.fo Norðoya Sparikassi í Miðlon, Tórshavn! www.ns.fo